**HAVBÚNAÐARFELAGIÐ**

**Umhvørvis- og Vinnumálaráðið**
**uvmr@uvmr.fo**

Tórshavn 2. september 2021

Okkara tilv./Our ref.
/Havbxn-HBF---Hoyringssvar-til-upp.docx
Tykkara tilv./Your ref.

## Hoyringssvar til uppskot til náttúruverndarlóg

Havbúnaðarfelagið takkar fyri møguleikan at viðmerkja uppskotið til nýggja náttúrverndarlóg, sum varð sent til ummælis.

Havbúnaðarfelagið fegnast um at man tekur stig til at dagføra føroysku náttúruverndina. Alt menniskjaligt virksemi hevur møguleika fyri at ávirka náttúruna, men tað er umráðandi, at ávirkanin er burðardygg, eisini yvir tíð. Ein ábyrgdarfull gagnnýtsla av náttúruni er neyðug fyri at vit framhaldandi skulu kunna liva í og av náttúruni í Føroyum.

Tað er ein torførur, men neyðugur kunstur at balansera atlitið til náttúruna við onnur samfelagsáhugamál, og tað virkar tí skilagott, at tað er sett sum alment krav í § 5, at tiltøk eftir lógini skulu vigast upp móti øðrum samfelagsáhugamálum.

Havbúnaðarfelagið hevur hesa ítøkiliga viðmerking til § 26:
Felagið heitir á Umhvørvis- og Vinnumálaráðið um at endurskoða ásetingina. Tað virkar bakvent, at ein almennur myndugleiki uttan nærri grundgeving kann havna einari umsókn um virksemi í einum øki, um ein verndarætlan er kunngjørd. Hóast ásetingin ikki forðar fyri, at ein almennur myndugleiki *kann* realitetsviðgera eina umsókn um virksemi í økinum, eigur tað at verða normurin at realitetsviðgerð av einari umsókn fer fram, uttan so at tað konkret verður mett ikki at bera til at viðgera hana, vísandi til verndarætlanina.

Vinarliga
Havbúnaðarfelagið

Niels Winther